JARÐFRØÐISAVNIÐ
Faroese Geological Survey

# Stjóri fyri samanlagda stovnin Jarðfrøðisavnið/Oljufyrisitingina

Jarðfrøðisavnið og Oljufyrisitingin skulu leggjast saman í ein stovn og í hesum sambandi verður søkt eftir stjóra til samanlagda stovnin.

**Arbeiðsøki**
Høvuðsuppgávurnar hjá stovninum verða at:
- Fyrisita kolvetnisleiting á føroyskum øki
- Kortleggja, savna og varðveita jarðfrøðiligt tilfar umframt at granska, ráðgeva og kunna um jarðfrøðilig evni og viðurskifti
- Standa fyri og luttaka í vísindaligum kanningarbeiði av týðningi fyri markseting og fyri gagnnýtslu av ráevnum
- Leggja til rættis umsiting av orkumálum, herundir at tilevna uppskot til komandi orkupolitikk og el-veitingarlóg

Stovnurin verður skipaður sambært reglugerð.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum av umsøkjarunum, at teir m.a. hava:
- Hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni
- Leiðsluroyndir innan almenna ella privata umsiting
- Royndir innan arbeiðsøkini hjá stovninum
- Góðar samstarvseginleikar umframt mennandi leiðslustíl

**Vit kunnu bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt og avbjóðandi starv í einum umhvørvi á høgum fakligum stigi. Ein av fyrstu uppgávunum verður, saman við starvsfólkunum, at skipa samanlagda stovnin og fáa hann at virka sum eina vælvirkandi eind.

**Løn og setanartreytir**
Setanarøkið er Vinnumálaráðið og stovnar undir ráðnum.

Starvið verður lønt ájavnt við 38. lønarflokk hjá Tænastumannafelag Landsins, men uttan at talan er um tænastumannastarv. Viðvíkjandi setanartreytum annars verður víst til avvarðandi sáttmála.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV o.o skulu sendast til: Vinnumálaráðið, Tinganes, Postbox 377, 110 Tórshavn. Umsóknir skulu verða Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi 23. juni 2005.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Starvið verður sett skjótast til ber. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Arna Poulsen, Vinnumálaráðið, tlf. 356060.

*Oljufyrisitingin er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Stovnurin umsitur kolvetnisvirksemi og orkumál. Uppgávurnar hjá fyrisitingini fevna m.a. um: eftirlit við leitivirkseminum eftir kolvetni, fyrireiking av útbjóðingarumførum og uppskot um dagføring av lógarverki. Harumframt verður arbeitt við at orða ein yviskipaðan orkupolitik fyri Føroyar.*

*Jarðfrøðisavnið er vísindaligur kanningarstovnur undir Vinnumálaráðnum. Ein av høvuðsuppgávunum hjá stovninum er, sambært galdandi reglugerð, at savna og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfrøðiligu náttúruvirðum.*

*Stovnarnir, sum hava arbeitt tætt saman í fleiri ár, halda til í felags hølum í Hoyvík. Tilsamans 24 fólk arbeiða á stovnunum.*

# Vinnuvegleiðari

**Arbeiðsuppgávurnar.**
- At menna arbeiðsmøguleikarnar hjá arbeiðstarnaðum fólkum. Hetta við at skapa samskifti við arbeiðsgevarar kring landið við atliti til, at fáa teir at lata hurðar upp fyri fólki við skerdum arbeiðsførleika, soleiðis at arbeiðsmarknaðurin verður rúmligari.
- At greiða hvønn áhuga og førleika tann arbeiðstarnaði hevur og at útføra ráðlegging fyri viðkomandi. At hava um hendi samskifti við tann arbeiðstarnaða.
- At skipa fyri arbeiðsvenjingum og útvega størv til arbeiðstarnaði fólk.

**Førleikakrøv.**
- Hevur hóskandi útbúgving, so sum sosialráðgevi, lærari, pedagogur, sjúkrarøktarfrøðingur, ergoterapeutur ella drúgvar royndir á arbeiðsmarknaðinum.
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevnir.
- Hevur koyrikort.

**Vit bjóða.**
- Nýggjar og spennandi avbjóðingar.
- Fjøltáttað og sjálvstøðugt arbeiði.
- Tætt samstarv við fyristøðufólkið.
- Møguleika fyri skiftandi arbeiðstíðum.
- Skeiðsmøguleikar.

**Lønar- og setanartreytir.**
- Sosialráðgevi, pedagogur ella ergoterapeutur verður løntur sambært avvarðandi sáttmála. Fólk við øðrum sosialfakligum førleika, verða lønt sambært starvsmannafelagssáttmálanum.
- Starvið verður sett við beinleiðis tilvísing til fyristøðufólkið.
- Starvið verður at seta 1. august 2005 ella skjótast tilber.
- Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristinu Larsen, fyristøðufólk á tlf. 211135.

**Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2005.**

Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
**Smiðjugerð 6, kj.**
**Postboks 301**
**110 Tórshavn**
***viðmerk á brævbjálvan: "umsókn vinnuvegleiðari".***

Niðanfyri sæst at lesa viðkomandi brot úr endamálsorðingini hjá ALV.

Endamál stovnsins er at vera arbeiðstarnaðum til hjálpar við framleiðslu og annars at hjálpa avlamnum til arbeiðis soleiðis:

a) at royna arbeiðsevnini hjá arbeiðstarnaðum við atliti til meting um møguleikar (arbeiðs/vinnuroyndir) hjá tí einstaka at arbeiða,
b) at menna arbeiðsmøguleikarnar hjá arbeiðstarnaðum sum heild,
c) at skipa fyri arbeiðsvenjing, endurbúgving og umskúling, so vinnutarnað aftur kunna fara til arbeiðis,
d) at skipa fyri fakligari útbúgving handaliga ella bókliga av arbeiðstarnaðum,
e) at skipa fyri vinnuligum vardum arbeiði fyri avlamnum, sum ikki hava førleikan at arbeiða í vanligari vinnu,
f) at stuðla arbeiðstarnaðum at fáa til vega tilfar til at virka og til at avhenda (selja) vørur, tey virka.

Sosialurin 341800

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!